ítróttur

Nr. 45 • mikudagur • 6. mars 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Bárður vann - kvinnurnar taptu

Tað gongur eitt sindur misjavnt á hjá føroysku flogbóltsútisetunum í Danmark. Í løtuni liggja bæði »føroysku« liðini tó á einum fjórða plássi, og endar kappingin so, koma bæði liðini í hálvfinalurnar. Men hvørki av liðunum hevur nógv at geva av

Bárður Mikkelsen og lið hansara Holte vunnu um vikuskiftið meðan kvinnurnar í donskum flogbólti taptu. Her er Bárður í dysti fyri landsliðið

Mynd: Álvur Haraldsen

FLOGBÓLTUR / ÚTISETAR
Sveinur Tróndarson

Føroysku flogbóltsútisetarnir í Danmark kappast framvegis av øllum alvi, og sjálvt um tey leggja slt tað tey eiga í sína ítróttargrein gongur ikki altíð eftir vild. Um vikuskiftið gekk soleiðis á hjá teimum báðum liðunum, at Holte IF og Bárður B. Mikkelsen vunnu sín dyst meðan Frederiksberg, við Anniku og Alvildu á liðnum, taptu sín dyst.

Neyðugur sigur

Bárður og Holte vóru í Middelfart og spældu móti Middelfart VK. Tað var sera týdningarmikið hjá Bárði og hansara monnum at vinna dystin, tí taptu teir kundi vegurin til hálvfinalurnar gerast ov langur.

Og úrslitið var, at Holte vann 3-1, men tað var einki í fyrsta setti, sum bendi á, at teir fóru at vinna dystin. Einu løtuna í fyrsta setti vóru teir nevniliga aftanfyri 16 – 4!

Tá munurin var so stórur gjørdu leikararnir av, at nú skuldi vendast og teir striddu seg upp á 16-25 áðrenn Middelfart vann fyrsta sett. Tey trý næstu settini vann Holte og tí vunnu teir eisini dystin við trimum settum móti einum, sjálvt um tað til tíðir var sera javnt.

Bárður Mikkelsen sigur, at tað tykist, sum hava teir fingið spælið at hanga saman og at teir tí hava betri vónir til tað sum eftir er av kappingarárinum.

–Móttøkurnar vóru sera støðugar í dag og tað var helst høvuðsorsøkin til, at vit vunnu dystin, sigur Bárður sum tykist vera komin fyri seg eftir skaðan hann hevði fyri kortum.

Í kvøld (týskvøldið) skulu Bárður og hansara menn aftur í eldin. Teir fáa vitjan av Gentofte Volley og var tað týdningarmikið at teir vunnu dystin í Middelfart leygardagin, er týdningurin av einum sigri móti Gentofte í kvøld ikki minni. Gentofte liggur nevniliga beint aftan fyri Holte við fýra stigum, sum er tvey minni enn Holte hevur.

Frederiksberg tapti

Var Bárður nøgdur eftir vikuskiftið, so hava Annika og Alvilda helst ikki verið so mjúkar at fáa til hús. Tær spældu sunnudagin móti Aabyhøj og sjálvt um tær vunnu tey bæði fyrstu settini, endaði dysturin við sigri til Aabyhøj, sum vann við settúrslitunum 20 – 25, 14 – 25, 25 – 17, 25 – 23 og 15 – 13.

Úrslitið kom stak illa við hjá Frederiksberg, tí sigurin hjá Aabyhøj var tann fyrsti í endaspælinum, men hetta er kanska eitt greitt tekin um, hvussu Frederiksberg er fyri. Fyri einari viku síðani vunnu tær á útivølli móti Holte, sum var silvurvinnari frá í fjør, og tí er tað helst eitt tekin um vantandi stabilitet, at tær taptu móti avgjørda botnliðnum.

Frederiksberg er framvegis á fjórðaplássi, men tær eru nú bara tvey stig framman fyri Rosenlund, sum hevur leikt ein dyst færri. Enn hevur føroyska liðið sjálvt møguleikan at avgera sína lagnu, tí í sínum seinasta umfari skulu tær nevniliga spæla móti júst Rosenlund.

Kvinnur

		K	V	T	Score	Pt
1	DHG Odense	8	8	0	24 – 6	16
2	HIK Aalborg	8	7	1	21 – 10	14
3	Holte IF	8	3	5	17 – 18	6
4	Frederiksberg Volley	8	3	5	16 – 20	6
5	Rosenlund Volley	7	2	5	11 – 16	4
6	Aabyhøj IF	9	1	8	7 – 26	2

Menn

		K	V	T	Score	Pt
1	HIK Aalborg	7	7	0	21 – 3	14
2	Skovbakken Volley	8	4	4	17 – 12	8
3	DHG Odense	7	4	3	14 – 13	8
4	Holte IF	7	3	4	11 – 13	6
5	Gentofte Volley	7	2	5	7 – 17	4
6	Middelfart VK	6	1	5	5 – 17	2

Stórkapping í fimleiki

FIMLEIKUR
Stefan í Skorini

Fríggjadagin skipar Fimleikasamband Føroya fyri stórkapping í rútmiskum fimleiki í høllini á Hálsi. Kappingin er fyri gentur og kvinnur.

Feløgini, ið luttaka, eru Flog úr Fuglafirði, Støkk úr Runavík, Havnar Fimleikafelag og Fimleikafelagið Ljósið úr Havn.

Feløgini fara at kappast í einari fríari seriu og einari amboðsseriu. Amboðini hjá gentum eru hoppibond, og kvinnurnar nýta gjarar (ringar).

Kappingin í ár er eitt sindur øðrvísi skipað enn undanfarin ár. Heiðursmerki vera latin vinnaranum av tí fríu seriuni og amboðsseriuni. Samanlagdi vinnarin verður kosin Føroyameistari.

Stórkappingin fyri tey eldru liðini verður fríggjakvøldið 8. mars í høllini á Hálsi.

Flogbóltskapping fyri yngru deildirnar

FLOGBÓLTUR
Stefan í Skorini

Flogbóltsfelagið Dráttur skipaði um vikuskiftið fyri flogbóltskapping í Vágunum fyri yngru deildirnar. 60 lið úr øllum landinum luttóku.

Hjá gentum 10 ár vann Fleyr, meðan KÍFb gjørdist nummar tvey og Nøvan var á triðja plássi.

TBa vann kappingina hjá gentum 12 ár. TBb var á øðrum plássi og KÍFa fekk bronsumerkini.

Hjá dreingjum 10 ár fór SÍ avstað við øllum heiðursmerkjunum. SÍb vann, SÍa fekk silvur og SÍc gjørdist nummar trý.

Hjá dreingjum 12 ár vann ÍFa, TBa var á øðrum plássi og Nøvan var á triðja plássi.

Árliga flogbóltskappingin fyri eldru deildirnar, sum Dráttur skipar fyri, verður spælt 16. mars. Hetta verður samstundis seinasta høvi hjá eldru liðunum at kappast í ár, nú flogbólturin verður lagdur burtur í summarhálvuni.

Jógvan Arge:

Vil hava glið á Tórsvøll

Jógvan Arge, býráðslimur, vil hava glið á ætlaðu útbyggingarnar á Tórsvølli, og hevur tí spurt borgarstjóran, nær býráðið fær umsóknirnar um víðari bygging á Tórsvølli til viðgerðar

Tórsvøllur hevur staðið í hálvum gekki nóg leingi, og nú skal glið koma á byggiætlanirnar kring vøllin

TÓRSVØLLUR
Stefan í Skorini

–Tórsvøllur hevur staðið í hálvum gekki nóg leingi, og tað er ikki rætt, at býráðið ikki svarar umsóknum og viðger málini viðvíkjandi Tórsvølli, sigur Jógvan Arge, býráðslimur.

Jógvan Arge hevur sett borgarstjóranum tveir fyrispurningur viðvíkjandi Tórsvølli. Jan Christiansen fer at svara teimum á býráðsfundi hósdagin

Hann hevur tí vent sær til Jan Christiansen, borgarstjóra, og biðið hann svara tveimum fyrispurningurm viðvíkjandi Tórsvølli.

Í fyrsta lagi vil hann hava borgarstjóran greiða frá støðuni í teimum málum, sum eru millum kommununa og Tórsvøll.

Í øðrum lagi vil hann hava at vita, nær býráðslimir kunnu rokna við, at málini, sum hava samband við víðari bygging á Tórsvølli, koma til viðgerðar í nevndunum ella býráðnum.

Útbyggingar

Grunnurin Tórsvøllur, ið er ogn hjá Tórshavnar Býráð, hevur ætlanir viðvíkjandi útbyggingum á Tórsvølli.

Grunnurin hevur søkt um loyvi at leggja tak omanyvir sitiplássini á eystaru síðu undir ítróttarhøllini á Hálsi. Harumframt hevur hann heitt á býráðið um at broyta byggisamtyktina fyri Gundadal til tað virksemið, sum er í Gundadali, og til virksemi, sum ætlanin er at hava í sambandi við Tórsvøll í framtíðini.

Tað hevur ljóðað, at grunnurin hevur ætlanir um at gera bygningar í hornunum til fyritøkur ella onnur at nýta. Hetta hevði givið Tórsvølli betri figgjarligar møguleikar at fáa hjólini at mala runt.

Umboð fyri Tórsvøll hava verið á fundi við býráðslimir og greitt frá framtíðar byggiætlanum á Tórsvølli. Her kom fram, at grunnurin hevur sent býráðnum fleiri umsóknir, men at tað enn ikki hevur svarað hesum umsóknum.

Tað er hetta, sum nú fær Jógvan Arge at seta borgarstjóranum fyrispurning viðvíkjandi Tórsvølli.

Helgi komin væl frá byrjan í DM

Liðið hjá Helga Winther Olsen, AIG úr Ålborg, liggur á fyrsta plássi eftir fyrsta umfari í donsku elitudeildini í fimleiki. Vónirnar fyri einum meistaraheiti eru tískil góðar

Helgi Winther Olsen og lið hansara úr Ålborg eru komin væl frá byrjan í donsku kappingini í reiðskapsfimleiki

FIMLEIKUR
Stefan í Skorini

Helgi Winther Olsen, sum vann fleiri gullmerki á Oyggjaleikunum í summar, er á odda við liði sínum eftir fyrsta umfar í donsku liðkappingini í reiðskapsfimleiki.

Fyrsta umfar í elitudeildini var leygardagin 2. mars, og hetta var tað fyrsta av tilsamans fýra umførum. Fýra lið eru við í kappingin, og tey eru NGF úr Nakskov, VIK úr Århus, Gefion úr Keypmannahavn og AIG úr Aalborg.

Seinasta ár var tað Gefion, ið vann kappingina, men í ár liggur AIG á odda eftir fyrsta umfarið.

Støðan aftaná fyrsta umfar:

1.	AIG	Aalborg	136,550 stig
2.	VIK	Århus	135,650 stig
3.	Gefion	Keypmannahavn	132,700 stig
4.	NGF	Nakskov	120,950 stig

Gekk væl hjá Helga

Í fyrsta umfarinum luttók Helgi á gólvi og í ringum. Tað gekk væl á gólvinum, har hann fekk næstbesta úrslitið á liðnum, og samanlagt var hann á sætta plássi eftir íðkanina á gólvi.

Helgi er á liði við sera góðum fimleikarum. Nevnast kann Tue Lodahl, sum í fjør megnaði at kvalifisera seg til eina HM finalu, sum tann fyrsti danin nakrantíð. Tue Lodahl er sostatt ein góður trumfur hjá Helga og teimum í AIG í stríðnum um DM-heitið.

Kappingin gongur soleiðis fyri seg, at í hvørjum av teimum seks reiðskapunum (gólv, beinsveiggj, ringar, lop yvir hest, barr og rekk) sleppa fýra luttakarir úr hvørjum felagi at gera eina íðkan, men bert tríggir teir bestu karakterirnir telja. Soleiðis verða tað 6 ferðir 3 karakterir, tilsamans 18 karakterir sum telja.

Havnamenn inn á Skála

HONDBÓLTUR
Stefan í Skorini

Veðrið var so vánaligt í seinastu viku, at tríggir hondbóltsdystir vórðu avlýstir vegna veður. Tveir dystir skuldu spælast á Skála millum kvinnu- og mansliðini hjá StÍF og Kyndli.

Hesir verða spældir í kvøld, mikukvøldið, ístaðin. Klokkan 18.30 verður dysturin millum kvinnuliðini hjá StÍF og Kyndil, og klokkan 20.00 spæla menninir hjá somu liðum.

Dysturin millum Neistan og Tjaldur varð eisini avlýstur í seinastu viku. Hesin verður spældur hóskvøldið klokkan 18.45 í høllini á Hálsi.